

Greipuvinnararnir 2000 - Mjølnir



Marjun Kalsø fær handað steyp frá Leivi Hansen, borgarstjóra í Havn

# Mjølnirkvinnurnar vunnu greipuna

*Flogbóltur, kvinnur: Tey flestu høvdu vænta, at Mjølnir fór at vinna steypafinaluna móti Drátti og tað gjørdu tær eisini rættuliga trygt. Dráttur kom ikki ígong fyrr enn í endanum av dystinum og tá var ov seint*

SVEINUR TRÓNDARSON OG ÁLVUR HARALDSEN

**Dráttur-Mjølnir 0-2 (16-21, 15-21 18-21, 22-24)**

Sum tær fyrstu í føroyskum flogbólti kunnu klaksvíkskvinnur kalla seg greipuvinnarar. Fyri viku síðani vunnu tær meistaraheitið og leygardagin vunnu tær eisini steypafinaluna. Ta fyrstu av sínum slagi og hóast Dráttur var væl við í endanum av dystinum, so var sigurin ongantíð í vanda.

### Betri á flestu plássum

Samanumtikið má sigast, at Mjølnir var betri á næstan øllum plássum. Marjun Kalsø var ikki so sjónlig, sum hon annars plagar at vera, men hon spældi kortini væl. Margit Joensen var einastandandi effektiv, serliga í byrjanini av dystinum, og sum dysturin leið komu eisini Tina Jacobsen og Tove Riksfjord væl við í spæli.

Í fyrra hálvleiki var ongantíð nakar ivi um hvønn veg sigurin fór, tí Mjølnir spældi væl betri enn Dráttur. Liðini fylgdust upp til 10-11 stig, men so settu klaksvíkskvinnur ferðina upp og vunnu restina rættiliga greitt.

Tað, sum nokk serliga var orsøkin til sigurin var, at Mjølnirkvinnurnar tordu betri at smekka til bóltarnar, hóast tær vóru eitt sindur kroystar, og tað gav úrslit. Móttøkuspælið hjá Mjølnir hevur ivaleyst verið betri í øðrum dystum, men tær vunnu kortini nógv álop við hampuligum móttøkum.

Harafturat vóru tær raskari í verjupartinum, tí tær fingu nógvar bóltar uppaftur, sum Dráttur slóg yvirum.

Og tað er kanska júst her, trupulleikin hjá Drátti er at finna. Serliga í fyrra hálvleiki vóru tær í so smædnar í álopinum og tað gjørdi, at Mjølnir verjan hevði eitt sindur ov lætt spæl.

Men tað batnaði, sum dysturin leið.

### Spenningur móti endanum

Tá seinni hálvleikur byrjaði sást, at Dráttur genturnar høvdu tikið annað skinn um bak. Í triðja setti vóru tað serliga Gerda Nattestad og Helga Nordendal, sum løgdu trýst á, og í fjórða setti blandaði Elisabeth Rasmussen seg eisini nógv í spæli.

Hetta hevði við sær, at Mjølnir nú skuldi verja á fleiri plássum og tað hevði við sær, at Dráttur í báðum teimum seinastu settunum í løtum var væl frammanfyri.

Men her komu so royndirnar Mjølnir til hjálpar. Tá á stóð vísti Marjun hvønn týdning hon hevur fyri liðið, tí tá hon fór aftur at serva í triðja setti servaði hon ein mun upp á seks stig innaftur í einum. Harðar og neyvar servur, sum Dráttur ikki fekk tamarhald á, og við eitt var støðan vend enn einaferð.

Og tá tað var vorðið javnt sá út til, at Dráttur fall eitt sindur í fátt og hóast tað er skilligt, so er tað kortini synd, tí tað hevði ikki bilað eitt petti, um dysturin hevði vart eitt sindur longur. Tað var nevniliga sera stuttligt at síggja, tí har vóru sera nógvir áhugaverdir bóltar at síggja.

### Gott at byggja á

Hóast vit mugu staðfesta, at tað var rætta liðið, sum vann og at sigurin hjá Mjølnir var fult uppiborin, so eigur Dráttur kortini stóran heiður av dystinum.

Mjølnir var betra liðið leygardagin eins og tær hava verið tað alt kappingarárið, men kortini vísti Dráttur tekin um, at har er tilfar, sum tær kunnu byggja eina framtíð á.

Dráttur hevur fleiri ungar leikarar, sum hava spælt í meistaradeildini fyri fyrstu ferð í ár og tær hava víst, at tær hava evnir. Tí eiga tær at taka finaluplássið leygardagin, sum eitt tekin um, at tær, um tær kíta se enn meir og fáa ein fastan venjara fyri alt árið, kunnu gera seg galdandi heilt har uppi, sum tað er ordiliga stuttligt at spæla.

Hjá Mjølnir er fyrsta greipan komin til høldar, men kortini er lítið at ivast í, at tær longu hava sett nøsina upp eftir tí næstu. Um tað fer at eydnast eins væl og tað gjørdist í ár, fáa vit at síggja, men ímeðan kunnu tær so fegnast um tvey gullheiðursmerki í hesum kappingarárinum.

Sosialurin ynskir steypavinnarunum hjartaliga tillukku við sigrinum.

*Hóast Dráttur royndi sítt, so vat tað ikki nóg mikið. Mjølnir var betri allan dystin og vann tí uppiborið*



*Klaksvíksgentur fegnast eftir sigurin á Drátti. Fremst Margit Joensen, sum spældi ein sera góðan dyst*





# Óvæntað men uppiborið

*Flogbóltur, menn: Rættuliga óvæntað vann Mjølnir steypafinaluna móti meistarunum úr Fleyr, sum sostatt taptu fyrsta dystin á árinum. Og sigurin var fult uppiborin*

**Sveinur Tróndarson og Álvur Haraldsen**

**Mjølnir-Fleyr 2-1 (21-17, 15-21, 7-2 16-21, 20-22, 15-10)**

Rættuliga óvæntað vann Mjølnir fyrstu steypafinaluna hjá monnum, sum var spæld í høllini á Hálsi leygardagin. Teir vunnu finalusigur á Fleyr og ikki er annað at siga enn, at sigurin var fult uppiborin tá til stykkis kom.

Gamaní vann Mjølnir bert tað eina settið, men tað er ikki ov nógv sagt, at tað var tað týdningarmiklasta settið teir vunnu, tí tað gav teimum trúnna uppá, at sigurin var til at fáa hendur á. Tað, sum manglaði í til sigurin, varð tikið heim í tveimum javnbrótarum. Einum lítlum um fyrsta hálvleik og tí stóra um dystin.

### Meira uppsettir

Tað er ikki ov nógv sagt, at Fleyr í ár, hevur verið liðið, sum øll hini hava elt. Landskappingina hava teir vunnið ruddiliga og tað sama hevur gjørt seg galdandi í steypakappingunum báðum – í Havn og í Klaksvík. Eingin hevur skala teir, tí teir hava bæði havt ta bestu manningina, men so sanniliga eisini tað skilabesta spælið.

Leygardagin var tað bara ikki til at fáa eygað á. Ikki í sama mun í hvussu er. Hinumegin netið stóð eitt lið, sum fyri alt í verðini vildi hava ein sigur, og hann fingu teir. Hann fingu teir við skilagóðum spæli, har alt, fyri einaferð skild, ikki hekk á herðunum á jugoslaviska venjaranum.

Tað gjørdi tað í fyrsta setti, tá hann var rættuliga einsamallur um stríðið, men í rsstini av dystinum fekk hann sera góða hjálp frá serliga Jóannes Poulsen, sum var framúr góður á miðjuni, John Syderbø, sum byrjaði ill men endaði væl og frá Hjalta Josephsen, sum fekk latið blokkin aftur, sum tað sømir seg.

Tað stutta av tí langa er nokk, at Mjølnirleikararnir vóru meira uppsettir eftir at vinna enn Fleyrleikararnir og tí gekk tað sum tað gekk.

### Spenningur allan vegin

Sum væntað fingu áskoðararnir ein spennandi og undirhaldandi dyst. Byrjanin var, sum vera mann eitt sindur trilvandi, men sum heild má sigast at spenningur var í allan dystin. Settmunurin var ongantíð serliga stórur, hóast Fleyr vann annað sett 21-15.

Hjá Fleyr var trupulleikin, at teir í byrjanini ikki fingu móttøkuna at liggja nóg væl, og hetta hevði við sær, at álopini vórðu ov løtt at byrgja upp fyri. Jan Hentze var nógv saknaður á kantinum har Pauli Hansen spældi og Rasmus Madsen fer neyvan at minnast finaluna aftur, sum sín besta dyst. Alt ov lítið trýst á og tað gav seg aftur tá klaksvíkingar fóru í álop.

Borko Ilic vísti í byrjanini sín týdning fyri Mjølnir og serliga nú Trygvi sat uttanfyri. Borko vann so at siga alt hann nært við, og tá Jóannes so smátt kom í gongd var og Hjalti og John fylgdu hansara dømi, so fekk Fleyr trupulleikar.

Fleyr royndi seg við nøkrum broytingum, sum muntu væl, men komu ov setin. Venjarin, Pascu Romica, sum byrjaði úti, setti seg sjálvan inn og Jóannes Eidesgaard fór út á kantin at spæla. Hetta hjálpti væl og serliga Jóannes fekk nógv burturúr. Fleyr vann bæði settini í seinna hálvleiki, men tað lá líkasum í luftini, at klaksvíkingar høvdu ikki slept endanum heilt – og so var.

### Endin á finaluni

Hóast klaksvíkingar høvdu tapt bæði settini beint frammanundan, so byrjaðu teir, sum eldur í krúti. Teir løgdu trýst á frá byrjan og tað er ikki óhugsandi, at tað tók Fleyr á bóli. Ongantíð fingu havnarmenninir frið til at fáa sítt spæl at virka og tá klaksvíkingar fóru í álop høvdu teir vápnini, sum Fleyr hevur havt í ár.

Borko Ilic var nú brádliga ikki einasti maður, sum Bogi hevði at leggja upp til, tí bæði John, Hjalti og Jóannes Poulsen buðu seg til, og tað var meira enn Fleyr blokkurin kláraði at taka sær av.

Mjølnir legði seg so langt framum, at tað gjørdist alt minni sannlíkt, at tað fór at eydnast Fleyr at vinna greipuna og tá so tveir leikarar sendu servurnar langt út av vøllinum í avgerandi løtum, sást skriftin á vegginum.

Mjølnir fór at vinna fyrstu steypafinaluna hjá FBF.

Samanumtikið má sigast, at sigurin hjá Mjølnir var uppiborin. Teir lótu seg ikki taka á bóli hóast Fleyr fekk eitt sindur av skili á sítt spæl, og tá avgerandi løtan kom, kendu teir sína vitjunartíð. At Fleyr kanska kundi havt framt broytingar skjótari, sum høvdu havt við sær størri effektivitet er ikki óhugsandi, men tað er so lætt at siga, nú dysturin er liðugur og væl tað.

Mjølnir kann tískil kalla seg steypavinnara hjá monnum tað næsta ári. Sosialurin ynskir steypavinnarunum hjartaliga tillukku við sigrinum og tað er púra vist ...



*Steypavinnararnir 2000 - Mjølnir. Ikki er so vist, at teir sjálvir høvdu væntað tað, men vónin var har*





*Endiliga eydnaðist Mjølnir at koppa Fleyr og tá tað hendi var tað í sjálvari steypafinaluni. So nú var árið ikki heilt spilt kortini ...*



*Ein sera rámandi mynd av dystinum. Klaksvíkingar vóru omaná tá tað galt. Hesaferð vóru havnarmenninir ov seinir at lata aftur*